# Skiparaskúlanæmingur er einsamallur á toppinum

**Jónhard Frederiksberg fekk í vetur landsliðsboð, og hann fer at kenna tað sum ein heiður, um hann aftur verður boðsendur, men í gerandisdegnum hugsar hann í fótbólti fyrst og fremst um Skála og møguleikarnar at yvirliva í fremstu røð**

JÓANNES HANSEN

Í venjingardystunum og kappingini um løgmanssteypið hevur Skála bara havt ein spælara heilt har frammi. Tað er Jónhard Frederiksberg. Hann kom aftur á liðið í fjør, eftir at hann mest sum einki hevði gjørt við fótbóltin í næstan fimm ár.

– Nú eri eg 22 ára gamal. Eg spældi nógv fótbólt frá tí, at eg var sjey ára gamal, og inntil eg var sekstan. Tá fór eg til skips, men tá ið eg í fjør legðist uppi aftur, bar aftur til at spæla fótbólt, sum mær dámart sera væl.

Hetta sigur Jónhard Frederiksberg, sum er strandingur og býr undir Gøtueiði. Hann legðist uppi, tí hann fór á skiparaskúla fyri knappliga hálvum øðrum ári síðani. Dagarnir eru langir hjá honum nú. Hvønn morgun fer hann við bussinum av Skipanesi og suður til Havnar. Tá ið hann er komin til hús aftur, skal hann yvir á Skála at venja, og so eru tað skúlatingini. Um alt gongur, sum tað skal, so verður hann liðugur við skiparaskúlan í summar. Hvussu tað so verður við skúlagongdini og harvið eisini møguleikanum at spæla fótbólt hevur hann ikki heilt gjørt upp við seg sjálvan enn. Annaðhvørt fer hann aftur til skips, og so verður sjálvandi eingin møguleiki at spæla fótbólt, ella fer hann at halda fram á sjómansskúlanum hálvt annað ár afturat, og so verður møguleiki at spæla fótbólt.

Eingin ivi hevur verið um góðu fótbóltsevnini, og tað hava aðrir sæð, enn teir á vestara armi á Skálafjørðinum. Jónhard var í síni tíð bæði á U-14 landsliðnum í Aberdeen og á U-16 landsliðnum, sum luttók í EM undankappingarbólki í Íslandi ímóti Luksemborg og Íslandi. Síðsta summar var tað okkurt av størru feløgunum, sum føldi seg fyri, um Jónhard var áhugaður í at skifta frá botnliðnum og til felag, sum var við í FM kappingini, men Jónhard helt seg á rókini.

Í vetur var landsliðið á venjingarlegu í Spania. Onkrir góvu avboð, og so varð Jónhard úttikin.

– Tað var sera hugaligt at gera ta royndina. Vit vandu og hvíldu nógv. Tað man ikki vera langt burtur frá tí, sum yrkisspælarar aðra staðni gera hvønn dag.

*Tað standa stórar avbjóðingar hjá landsliðnum fyri framman. Landsliðið skal spæla í Íslandi, og Týskland skal spæla í Føroyum. Er hetta nakað, sum tú hugsar um?*

– Sjálvandi veit eg hetta, og eg haldi, at tað verður rættuliga spennandi og ein veldug avbjóðing fyri spælararnar, sum verða úttiknir. Men hetta er ikki nakað, sum fyllir nógv í mínum hugaheimi, um tú hugsar um dreymin at sleppa upp í part. Í fótbólti eru tað dagligu uppgávurnar á Skála, sum tað snýr seg um. Ætlar landsliðsvenjarin at senda boð eftir mær, so er hann væl komin, men hetta taki eg, sum tað kemur, sigur Jónhard Frederiksberg, og tað tykist sum um hann hevur bæði beinini heilt niðri á jørðini.



*– Tað er torført at siga, hvussu tað fer at hilnast hjá okkum. Men tað er greitt, at tað verður strevið, sigur Jónhard Frederiksberg, sum fyri tað mesta higartil í ár hevur verið rættuliga einsamallur í Skála álopinum.*

Mynd: Álvur Haraldsen

## Ungt lið

Tá ið prátið aftur verður snarað ímóti Skála og kappingarárinum, sum stendur fyri framman, so heldur álopsspælarin, at úrslitini í venjingardystunum og steypakappingini hava víst, at tað verður eins strevið í ár, sum tað var í fjør, og helst uppaftur torførari.

– Vit hava mist nógvar spælarar. Tí er neyðugt at spæla eitt nýtt lið saman, og tað tekur sína tíð. Vit hava fingið nýggjan venjara, og hann veit, hvat hann vil. Ein av trupulleikunum hjá honum og okkum er kanska, at liðið sum heild ikki hevur ta samansetingina, sum tað hevði verið ynskiligt, tá ið hugsað verður um aldur og rutinu. Einasti føroyski spælarin, sum ikki kann roknast at hoyra til tað yngra ættarliðið í fótbólti, er Agnar Højgaard. Hann hevur ikki spælt tey seinastu árini, men nú er hann byrjaður aftur, og vit eru fegnir um at hava fingið hann aftur til Skála, eftir at hann m. a. hevur roynt seg í GÍ. Í fleiri dystum í bólkaumfarinum í steypakappingini havi eg verið einsamallur í álopinum. Eg eri 22 ára gamal. Teir báðir aftanfyri meg hava verið Bogi Gregersen – vit eru javngamlir – og so Hanus Thorleifsson, sum ikki verður átjan fyrr enn í desember. Pauli G. Hansen plagar eisini at spæla í hesum plássinum. Hann er eisini javngamal við meg, sigur Jónhard Frederiksberg.

Í fjør gekk leingi sera striltið hjá Skála. Men so glapp, og fram ímóti kappingarenda vunnu teir tríggjar ferðir.

– Tað kunnu vera fleiri frágreiðingar upp á, at tað broyttist. Ein er, at vit tá spældu ímóti liðunum, sum vit kappaðust við fyri at sleppa undan niðurflytingini. Men brádliga var tað nógv stuttligari at spæla. Tá bar tað til, um ikki hevði borið til frammanundan, vit fingu mál upp á møguleikarnar, sum vit ikki høvdu skorað uppá, og harvið øktist sjálvsálitið. Men tað var ivaleyst júst hetta, sum vit vóru inni á við stabilitetinum, ið gjørdi seg galdandi. Tí er tað torført at siga, hvussu tað fer at hilnast hjá okkum. Men tað er greitt, at tað verður strevið, sigur skiparaskúlanæmingurin, sum fyri tað mesta higartil í ár hevur verið rættuliga einsamallur í Skála álopinum.






